## Vegleiðing til nýggj umvend

**16. februar 1906**
Síðan eg kom aftur til Føroyar eftir eina stutta vitjan í Skotlandi, havi eg doypt átta trúgvandi. Men nú er kirkjan farin at halda fyrilestrar um barnadóp og biður fólk um ikki at fara frá teimum gomlu siðunum. Tey siga, at vit synda móti heilaga andanum, tá ið vit doypa fólk aftur. Men framvegis koma fólk, sum stúra fyri teirra sáls frelsu til okkara møtir, og nøkur eru farin frá deyða til lívið. Tey vátta, at tey hava verið í myrkri men eru komin í ljósið.

Um Gud vil, fara eg og kona mín í morgin til Suðuroyar. Ein ungur bróður úr Havn (helst Poli í Dali, kendur sum skipari og vinnuligur slóðbrótari) hevur verið har, og okkara himmalski faðir hevur signað hansara boðskap, so nógv eru frelst og hava fingið undirvísing í Guds orði. Biðið fyri hesum nýumvendu, fyri okkum og fyri arbeiðinum. Gud hevur byrjað arbeiðið millum fólkið og mong føla byrðina av synd síni.

## Til Sørvágs

*Í 1907 hevur Daniel skrivað eina longri frágreiðing, og tað verður bert ein partur endurgivin í blaðnum. Men her sigur hann:*

Í byrjanini av januar var eg leiddur at fara til Sørvágs, har tað búgva 500 fólk. Tveir trúgvandi búgva har, men teir eru ikki rættuliga loystir frá bondunum hjá gomlu kirkjuni, sum binda fast og taka alt frælsi frá teimum trúgvandi. Kona mín, sum er við mær, er ein stór hjálp við at syngja. Stundum taka vit orglið við okkum, tí fólkinum dámar væl góðan sang, men tey duga ikki at syngja okkara sangir. Eg leigaði eina stóra dansistovu at halda møti í, og vit høvdu stólar til 100, men tað fyrsta kvøldið komu 150, og næsta kvøld vóru tey 250. Nógv máttu standa uttanfyri, men øll kundu tó hoyra tað, sum sagt varð.

Hetta kvøldið kom presturin í oynni og tosaði ímóti okkum. Hann segði fólkinum, at tey vórðu Guds børn í dópinum, og tí skuldu tey halda seg til tað gamla. Men fólkið hevur ikki álit á tí gamla. Henda talan skaddi okkum ikki nógv.

Eg vísti aftur tað, sum prestur hevði sagt til verju fyri barnadóp.

Kvøldið eftir komu 150. Bakarin í bygdini varð umvendur og vitnaði um hetta næsta dagin fyri ætt og vinum. Fólk søgdu, at hann var svakur, men Gud havi



*Hetta var herurin hjá Leopold kongi Force Publique, sum við hvítum yvirmonnum framdi ágangin móti teimum innføddu*



*Dømi um innfødd, sum er skotin og mishandlað av hermonnum. Hetta er mynd sum væl kann hava verið tikin av D. J. Danielsen*

tøkk fyri alt slíkt.

(Hetta hevur vist verið Martin Nielsen, stóri Martin nevndur (1878-1951). Hann og kona hansara Jacobina vóru tey fyrstu, sum fluttu til Vatnsoyrar.)

Hesin maður hevði havt ófrið í 12 ár, og hevði roynt nógvar hættir at fáa frið í sálina, men var bert sokkin djúpari í synd. Nú hevði hann funnið frið og megi at halda fram.

Ein handilsmaður í bygdini tók eisini ímóti Kristusi.

*Hetta hevur helst verið Niclas Niclassen Norðuri í Stovi (1873-1939. Hann var eisini eina tíð tinglimur. Kona hansara Frederikka (1876-1962) var systir Martin Nielsen).*

Hesin maður hevði ikki lagt nógv í sína sál, og hann fortaldi mær eitt kvøld eftir møtið, at hjarta hansara var hart sum steinur. Nakrar dagar seinni hevði hann fingið eina slíka sálarneyð, at hann læsti handilin og lat kundarnar standa uttandura, meðan hann bað meg koma inn á skrivstovuna, har eg fortaldi um vegin til Gud.

Áðrenn eg fór av bygdini aftur takkaðu handilsmaðurin, kona hansara og eitt tænastufólk Gudi fyri, at hann hevði sent sín einasta son at doyggja fyri tey. Eg havi hoyrt, at hann nú vitnar fyri kundunum hjá sær. Tað sama er við konu hansara, og nú eru níggju kristin á hesum plássi, sum koma saman at biðja og at lesa Guds orð. Hesi nýumvendu trúgvandi mugu líða forfylging og tørva forbøn.

Presturin hevur verið í bygdini og biðið fólkið um at standa stinn. Men tað er ikki so lætt at standa stinnur, tá einki er at halda fast um.

*Her kann verða skoytt uppí, at seinni kom Poul Andreas Poulsen við í samkomuna, har hann var sera virkin upp í ellisár. Hann plagdi annars at hava til fragd at gera ónáðir, tá ið Daniel helt møtir í Sørvági. Poul Andreas var giftur við Mariu, dóttir Jóan Paula við Neyst, sum var ein tann fyrsti í samkomuni í Hvalba.*

*Í Gásadali var eisini ein samkoma, sum eisini fekk vitjan av Dollanum. Hetta má hava verið í samband við vitjan í Sørvági. Hetta nevnir hann kortini ikki.*

## Aftur í Porkeri

Nú eri eg í Porkeri. Seinasta vetur komu nøkur fá her at kenna sannleikan, og tey eru vaksin í náði. Tey eru 12 í tali og eru nú við at byggja ein lítlan møtisal. Tey eru øll arbeiðs- og fiskimenn. Eg síggi ein stóran mun á teimum frá seinasta vetur. Vit mugu vitja tey oftari við orðinum, tí summi av teimum hava ikki heilt slept teirra gomlu trúgv, og eingin av teimum er enn doyptur.

Eg havi havt trý møti her, og eg hava prátað við tvey, sum eru í sálarkvøl. Eg vitji tey heima um dagin, og tali orðið í einum stórum pakkhúsi um kvøldið.

## Í Sumba

Í Sumba búgva eini 400 fólk. Tað verður ringt hjá mær at fáa innivist har ella hús at tala í, tí fólkið har livir í stórum myrkri. Eg ætli tó at fara um fjøll hagar, og Harrin vil opna dyrnar.

Um eg hevði havt útgerð til at vísa evangeliskar ljósmyndir, hevði tað verið sera væl egnað til arbeiðið, tí nógva staðni ræðast fólk at koma á møti vegna prestarnar. Eg trúgvi, at mong kortini vilja koma undir ávirkan av orðinum.

**11. apríl.**
Síðan eg seinast skrivaði, havi eg verið í Sumba. Fólkið vildi illa hýsa okkum í fyrsta umfari, men eftir fyrsta møtið var alt í lagi. Tað komu fleiri at lurta eftir góðu tíðindunum, enn rúm var fyri. Tey keyptu nógvar bíbliur og bóðu okkum koma skjótt aftur, tí teimum longist at hoyra orðið aftur. Eingin hevði vitjað Sumba í hesum ørindum í 21 ár, tá ið bróður Sloan var seinast.

## Tvøroyri

Eg vitjaði eisini Tvøroyri, størsta býin í oynni. Vit høvdu eitt gott møti, størri enn eg hevði havt fyrr. Vit leigaðu ein sal, og nógv av tí betra slagnum komu at lurta, summi søktu vegin til lívið.

Í Vági gekk verri. Har fekst hvørki innivist ella salur. Tey vóru so rædd fyri, at eg skuldi gera tey til baptistar. Nú havi eg so bílagt ein sal at syngja og vísa myndir. Tað er júst í slíkum plássum, at myndsýningartól hevði verið hent.

Tað hevur eisini verið góð luttøka í Havn, men her eru fólk ikki so áhugað sum á bygd, har evangeliið ikki fyrr er prædikað. Men tað gongur tó spakuliga framá.

Hetta hevur verið ein harður vetur, og síðan eg kom aftur, havi eg ikki havt tað so gott. Eg má fara til ein lækna, men vit hava ein stóran lækna, sum altíð er nær. "O, Harri styrk okkara trúgv."

*Í Vági kom ein samkoma, kallað Bethel. Menn, sum komu at hava stóra ávirkan her, vóru skiparin og reiðarin Dias á Heyggi, sum flutti úr Porkeri til Vágs og skiparin Jóan Petur hjá Mouritsi. Á Tvøroyri kom eisini samkoma, og ein kendur maður í hesum sambandi er bókbindarin D. J. Magnussen.*